# Samhaldsfesti ella sjálvsøkni

JENIS AV RANA
formaður Miðfloksins



Sum sjáldan áður hevur fíggjarligi byrðurin verið føringum blíður farnu árini. Ein vøkstur í A inntøkum, ið táttar í 1 ½ milliard og ein bankapolitikkur, ið skundaði undir privatu nýtsluna og harvið inntøkur landskassana, góvu best hugsandi fortreytir fyri at lyfta tjóðina á eitt hægri støði. At styrkja vælferð og røkt, tryggja verandi grundarstøði- og leggja lunnar undir endurnýggjan av samfelagnum.

Tíverri avdúkar hvør dagur eina samfelagsleiðslu farnu árini, ið á økjum nærkast vanrøkt. Niðanfyrinevndu viðurskifti eru ein partur av dømum, ið vátta hesa útsøgn.

**Heilsuskipanin fyri børn og ung, ið ongantíð kom**
Hin 27 apríl 2005 feldi Føroy Løgting uppskot frá Miðflokkinum um løgtingslóg um landsskúlalæknaskipan og samtykti ístaðin, hin 4 mei sama ár, løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung. Tóat gott og væl 3 ár, t.e. fleiri enn 1100 dagar, eru farnir síðani hesa samtykt, so hendi einki. Hetta hóast kent og alment góðtikið er, at fyribyrging er mangan ferðir meira verd enn viðgerð.

Harmuligt er at staðfesta, at hendan skipan, sum skal tryggja børnum og ungu okkara bestu menningarmøguleikar, er so vanrøkta í best hugsandi tíðum.

Hví?- spyr tú kanska. Sama havi eg spurt, ferð eftir ferð. Ein undanførsla fyri onnur eftir hevur verið svarið, ongin av teimum virðulig ella nøktandi. Á tingi herfyri gjørdi undirritaði tí púra greitt, at tol Miðfloksins við umsitingina av hesum øki, er við at vera uppi. Tað meta vit, at vit skylda komandi ættarliðum!

**Manglandi tunnilstrygdin**
Seint í heyst svaraði táverandi landsstýrismaðurin í samferðslumálum fyrispurningi frá undirritaða um gomlu tunnlarnar. Í svarinum váttaði hann, og sama hevur núverandi landsstýriskvinnan síðani gjørt, at fleiri av hesum tunnlum á ongan hátt liva upp til tey trygdarkrøv, sum í dag verða sett.

Hóast hetta varð lítið og einki gjørt í gulltíðunum við at viðlíkahalda og dagføra hesar tunnlar. Úrslitið er, at ynskini um nýggjar, og sjálvsøgdu krøvini um røkt teirra gomlu, eru endaði í einari sannari fløkju. Einari fløkju, sum saman við manglandi røktini av øðrum økjum, m.a. heilsuøkinum og skúlaøkinum, hevur sett annars ríka føroyska samfelagið fleiri ár aftur í menning.

**Afturútsigldir skúlar**
Fyri 4 árum síðani vóru bert snøklar eftir av fyrireikingum til byggjan av skúladepli, ið vildi nøkta tørvin hjá handils- tekniska og studentaskúlanum. Í dag, 4 ár seinni, eru vit ikki komin úr stað. Tað sigst, at innanhýsisklandur var orsøkin til at so varð. Og meðan politikkarar, ið burdu verið meira at sær komnir, klandraðust, hava næmingar gingið í skúlum, sum á ongan hátt nøkta nútíðarkrøv, og sum, eins og gomlu tunnlanir, als ikki liva upp til tey heilsu og trygdarkrøv, sum verða sett í dag.

**Vanrøktin av sjúkrahúsverkinum**
Neyvan er dagur farin seinastu tíðina uttan avdúking av vánaligu støðuni heilsuverk okkara er komið í. Fyri at kunna nøkta basalu tørvirnar farna ár varð neyðugt at brúka tvíciffra milliónа krónutal meira enn játtað varð á fíggjarlógini. Um játtaða krónutalið kundi havt rokkið, er møguligt, men hesum kjaki óviðkomandi. Tí vanrøktin liggur í, at man ikki játtaði tað peningaupphædd, ið neyðug var undir tí skipan, ið var galdandi- ella setti kanning í verk ( júst sum núverandi landsstýrið hevur gjørt ) fyri at finna útav, um broytingar kundu verið gjørdar í skipan og bygnaði, ið vildu bøtt um raksturin.

Bara at lata standa til og onki gera, hevur ført meginsjúkrahús okkara út í eina kreppu, sum fleiri enn ein, ið hava innlit í verkið, frykta fyri kann taka beinini undan tí.

**Vælferðin kom í aðru røð**
Hvussu kundi samfelagið ikki verið ment, um teir flokkar, sum fyri 4 árum síðani valdu at mynda stjórn, høvdu valt samhaldsfesti framum høgravent sjálvsøkni? Um peningatreymurin hesi árini, ístaðin fyri m.a. at fari til skattalættar til vælbjargað, varð brúktur at styrkja og tryggja vælferðarsamfelagið Føroyar?

Kanningar í grannalondum okkara vísa, at borgarar har velja vælferð framum skattalættar. Vilja heldur hava trygg heilsuverk, almannaverk, skúlaverk og vit kundu hildi á, enn skattalættar. Ivist onga løtu í, at føringurin hevði givið somu boð, varð hann spurdur. Heldur dagførdar skúlar, heldur tryggar heilsuskipanir, heldur sjúkrahúsverk á høgum støði, heldur eitt nútíðar og trygt samfeðslukervi v.m., enn eina heimagjørda skattahugsan, sum neyvan nakar í heiminum utta nakrir fáir høgravendir føringar, taka undir við.

**Vælferð og samhaldsfesti í fremstu røð**
Komandi mánaðir, til nýggj fíggjarlóg verður løgd fram tíðliga í heyst, verða sera áhugaverdir og avgerandi fyri okkum øll. Spennandi verður at síggja, um samgongan torir nýhugsan og hevur dirvi at taka tey tøk, ið eru neyðug, fyri at rætta samfelagskósina. Tí rættast má hon, ikki bert á omanfyrinevndu, men so mongum øðrum økjum.

# Fрískúlar fyri tey útvaldu

RANNVEIG HOVGAARD



Royniberini eru ikki súr.

Tá eg byrjaði í studentaskúlanum í Hoydølum fyrst í 70´unum, var eitt tað fyrsta, eg upplivdi, at ein av lærarunum spurdi okkum ein og ein, hvat foreldrini hjá okkum gjørdu? Lærarin vildi staðfesta sína teori, um at børn hjá bóndrum blivu lærarar, og børn hjá lærarum blivu akademikarar. Í okkara flokki, sum taldi nøkur og tjúgu ung fólk úr øllum landinum, kundu tey foreldrini teljast á einari hond, sum onga útbúgving høvdu.

Eg minnist, hvussu foy eg gjørdist, tá ið eg mátti viðganga, at pápi mín "bara" var vanligur fiskimaður (orsaka pabba, eg veit at tú vart ein óførur trolmaður). So her vóru tað yvirhøvur børnini hjá betra slagnum í Føroyum, sum vóru komin saman at halda skúla.

Í dag er vent í holuni í studentaskúlanum. Nú er tað veruliga ein skúli fyri øll! Eg eri tí so ógvuliga ørkymlað, ill og kedd um, at vit nú eru í ferð við aftur at seta skilnað í millum fólk her á landi. Her hugsi eg um, at tað er vorðið so heilt fantastiskt at ganga í frískúla. Dimmalætting gevur enntá mentunnarprís fyri nýskapandi skúlavirksemi til frískúlan á Velbastað. Eitt mentunnarbragd kalla tey tað.

Lat meg beinanvegin gera greitt, at hetta eg skrivi, als ikki er vent í móti lærarunum í frískúlanum á Velbastað, sum uttan iva gera eitt sera gott arbeiði. Og tað kunnu tey í veruleikanum eisini: Tríggir lærarar við 15 børnum, teir sjálvir hava valt út. Hetta eru børn hjá foreldrum, sum hava ráð og vilja gjalda fyri at lata børn síni fara í skúla. Uttan iva eru hetta foreldur við hægri útbúgvingum ella í góðum størvum, og mínar royndir sum lærari í 25 ár siga mær, at slík foreldur eru sera engagerað í skúlanum hjá barni teirra. Tað vil siga, at her uttan iva er talan um børn, sum eru væl svøvnt, eru væl ílatin og hava góðar matpakkar við.

Tað má vera ein dreymur at undirvísa slíkum børnum i einum slíkum skúla!

Eg trúgvi tó ikki, at fríkskúlin á Velbastað gevur so nógv øðrvísi undirvísing enn hin skúlin á Velbastað, sum hýsir øllum børnum.

Vit eru farin undir at skilja børn sundur, alt eftir hvussu nógv foreldrini forvinna, og tá haldi eg, at okkara samfelag missir sera nógv. Tað, sum eyðkennir okkara samfelag, er, at vit kennast øll, og tí hava vit ikki longur undirbrotliga virðing fyri teimum, sum eru betur fyri fíggjarliga.

Vit hava kanska gingið í sama flokki sum løgmaður, vit hava, ið hvussu so er møguleika fyri tí, men um vit skulu satsa upp á fríkskúlar, so endar tað við, at alt samfelagið verður nógv meiri stættarbýtt, enn tað er nú. Um hetta heldur fram, og bløðini og kringvarpið framvegis dyrka hesa sundurskiljingina av børnum, so endar fólkaskúlin við at vera ein skúli fyri tey veikastu í samfelagnum.

Ein starvsfelagi mín tók til herfyri, at í dag búgva tey penu og klóku í Havn. Soleiðis kann eisini vandi verða fyri skúlunum framyvir. Frískúlar til tey klóku og ríku. Fólkaskúlin til tey býttu og fátæku.

Hetta líkist ongum. Eg má tí seta spurnartekin við, hvar politikarar okkara eru.

Eg ivist í, um teir innast inni hava givið sær far um, hvat vit eru á veg út í, og hvørjar langtíðaravleiðingar tað fær á okkara samfelag, tá ið seráhugamál í samfelagnum sleppa at taka seg burtur úr tí samhaldsfasta samfelagnum.

Eg haldi, at tað er stórur vandi fyri, at sosiala medvitið og samhaldsfasti hugburðurin, sum verður lagdur í børnini, sum eru saman við øllum stættum í einum fjøltáttaðum skúla, skjótt kann gerast ein trotvøra í einum einsrættaðum fríkskúla, har øll eru sama slag.

Hví stuðla og menna politikararnir ikki heldur fólkaskúlanum, sum í veruleikanum er ein góður skúli, har børn læra tolsemi mótvegis sínum meðmenniskjum, tí tey møta børnum úr øllum stættum í samfelagnum.

Eg veit væl, at happing fer fram, og at tað er ymiskt, hvussu skjótt børnini læra at lesa, skriva, rokna o.s.fr., men tey fáa eina barlast til restina av lívinum, sum tey uttan iva fáa gleði av í arbeiðslívinum seinni, júst tí tey kenna allar samfelagsbólkar. Og nógvir lærarar í fólkaskúlanum arbeiða hvønn einasta dag fyri at byrgja upp fyri happing og fyri at geva víðari grundleggjandi skúlaførleikar, og tí haldi eg at vit lærarar í fólkaskúlanum skulu rætta ryggin. Yvirhøvur gera vit eitt gott arbeiði! Men vit hava ov nógv at gera, tí vit - eins og fríkskúlin á Velbastað - taka støði í einstaka barninum, men tað er altíð eitt sindur truplari at gera tað, tá tú stendur sum einsamallur lærari við yvir tjúgu børnum, enn tá ið tað eru tríggir lærarar um 15 børn, sum teir sjálvir hava valt út.

# Tveir tunlar

ZAKARIAS WANG



Úr køksvindeyganum síggi eg inn á Nes. Strekkið er stutt, men tað er langt at koyra úr Hoyvík.

Nú skal politiska skipanin viðgera, hvussu tunnilin millum hesar báðar bygdir skal raðfestast í mun til aðrar íløgur.

Serliga er eitt vandamál, og tað er, at løgtingið hevur samtykt, at tunnil ikki bert skal gerast til Sandoynna, men eisini til Suðuroyar.

Hetta er ein verkætlan, sum loysir seg avbera væl.

Sum er noyðist tað almenna at halda uppi sambandinum við hesar oyggjar, og tað kostar skattgjaldarunum og ferðafólki umleið hundrað milliónur krónur um árið. Gera vit í staðin íløgu í tunlar til hesar oyggjar, spara vit hesar alstóru árligu rakstrarútreiðslurnar og fáa haraftur eitt nógv betri samskifti í lag við henda tíggjundapart av landi okkara.

Fyri tey fólk, sum har búgva, kemur hetta fyrst og fremst at merkjast á tann hátt, at virðið av húsum teirra fer upp. Tað er kanska í so høgt sett, at tað verður eina millión fyri hvørt húsið, men nøkur hundrað túsund fer tað í hvussu so er at verða talan um. Hendan virðisøking kemur av tí, at tunlarnir fara at gera tað lættari hjá vinnulívinum at fáa arbeiðsmegi til og frá, og at tað tí verður hugaligari at búgva í hesum tí heitasta partinum av landi okkara.

Spurningurin er bert, um hetta er ein íløga sum vit kunnu gera her og nú.

Hesum er neyvan nakað at ivast í.

Í løtuni er talan um ein ávísan stíg í tí framburði, sum hevur verið í nøkur ár. Tí kann hugsast, at vit fara at fáa nakrar tómar hendur, sum kundu verið nýttar til eina slíka stóra verkætlan. Tey sum hava ríkiligt gjaldføri, hava ilt við at fáa rentu av íløgunum. Rentan gerst tí lág. Tá ber til hjá tí almenna at taka upp lán til slíkar verkætlanir sum hesa, og tí er júst nú rætta løtan at fylgja løgtingssamtyktini um at gera tunnil til Suðuroyar.

Men hvat so við tunlinum inn á Nes?

Tann dag, ið tað almenna sleppur frá at gjalda raksturin av siglingini til oyggjarnar sunnanfyri, fara vit at hava ráð til mangt og hvat, og tá kemur tunnilin millum Hoyvík og Nes at vera heilt ovarliga á breddanum.